# Apríl-kappingin

Sosialurin

## SUDOKU

Hvønn dag í apríl mánaða verða Sudoku uppgávur at finna í Sosialinum.

Jú fleiri uppgávur, ið tú hevur loyst, tess størri møguleika hevur tú at vinna.

Sendið okkum loysnina innan mánadagin 9. mai 2011 kl. 10.00 og merkið brævbjálvan »Sudoku«.

Drigið verður í viku 19.

Fyri at vera við í kappingini, skal øll uppgávan verða loyst.

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | 6 | 8 | | | | | |
| | 2 | | 6 | | | 8 | | 5 |
| 9 | 8 | | | | 4 | | 3 | |
| | 4 | 9 | | | | | | |
| 1 | | | | | | | | 3 |
| | | | | | | 7 | 4 | |
| | 5 | | 7 | | | | 1 | 4 |
| 2 | | 3 | | | 1 | | 8 | |
| | | | | | 3 | 2 | | |

Vinningurin í apríl er ein **BlackBerry Gemini - 8520** fartelefon frá **Vodafone**

**Virði tilsamans: kr. 3.495,-**

Navn: ____________

Bústaður: ____________

Telefon: ____________

### Fakta um BlackBerry Gemini - 8520

- Egið minni 256 MB
- Møguleika at útbyggjað minni upp til 32GB
- MicroSD minnskorti
- Bluetooth 2.0 við A2DP
- Wifi 802.11 b/g
- Stand-by 408 tímar (17 dagar)
- Talutíð 4 tímar og 30 minuttir
- 2 MP-myndatól
- Media player
- Tónleika spælari MP3/AAC/AAC+/WMA/ASF
- Video spælari H.263/H.264/WMV
- BlackBerry maps
- Blackberry Messenger



Sendið til: Sosialin · Boks 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan »Sudoku«

vodafone
power to you




# Aðalfundur

Aðalfundur verður í húsum felagsins hósdagin 05.05.11, kl. 19.00

**Bygdasavnið FORNI**
*Glyvrar*



# Kom til Nólsoyar tí her er ...

og hugna tær við bindimaskinuni fríggjakv. 6. og leygardagin 7. mai. Kostnaður 50 kr. Ring 217002 ella email: a_ryggi@olivant.fo


## Tvingsilssøla

17. mai 2011, kl. 09:45 verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1, 100 Tórshavn hildin tvingsilssøla yvir ognina matr.nr. 1368, Klaksvík (AS nr. 2-32/2011).

Sambært tryggingarskjalinum er bygda økið 80 m² í trimum hæddum og sambært tingbókiniergrundøkið 105 m².

**Húsini eru nærri innrættað soleiðis:**

**Miðhædd:** Durur/gongd við trappu uppá ovaru hæddina, tvey kømur, wc, køkur, stova og kamar við útgongd til altan.

**Loft:** Baðirúm, tvey kømur og stova.

**Kjallari:** Eitt neyst við fýrrúmi, umframt eitt opið rátt rúm.

Húsini treingja til ymiskar ábøtur og viðlíkahald.

Tvingsilssølan er umbiðin av Inga Højgaard, adv., Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 203040 (sak nr. 5266401), sum kann geva nærri upplýsingar um ognina.

Tvingsilssøluuppgerð kann umbiðjast hjá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á Dómaraskrivstovuni.

**Føroya Fútarættur**

ÚTBJÓÐING

### Tekniski skúli í Klaksvík, Skúlaheimið

Við hesum verður arbeiðið at skifta tekju á Skúlaheiminum í Klaksvík boðið út í almenna lisitatión.

Arbeiði fevnir í høvuðsheitum um endurnýggjan av útsíðum:
- Nýggja bjálving og klæðing av útsíðum, uppsett á stálgrind
- Nýggj vindeygu
- at bjálva takrúm

Arbeiðið skal gerast í tíðarskeiðinum 06.06 – 15.09.2011 og í juli - august 2012.

Lisitatiónin verður mánadagin 23.05.2011, kl. 14.00 á Tekniska skúla í Klaksvík.

Útbjóðingartilfarið verður bert útflýggjað digitalt, og verður tað sent teimum bjóðandi 02.05.2011.

Bílegging av tilfari fer fram áðrenn 29.04.2011 við at senda teldupost til gugu@lv.fo.

Tá boðið verður um útbjóðingartilfar, skal upplýsast:

- Navn og bústaður á virki.
- Kontaktpersónur og telefonnummar.
- Teldupostadressa.
- Vinnutal.

SENDISTOVAN

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, 110 Tórshavn | Tel. 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*

*Landsverk er ein stovnur undir Innlendismálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallamál, herundir tyrlupallar.*


Zarepta



# Lega fyri støk á Zarepta

Legan er fyri øll støk, 30 ár og eldri.
Legan byrjar fríggjakvøldið 13. mai kl. 19. og heldur fram til eftir døgurða sunnudagin 15. mai.

Evnið verður
Vel lívið!

Tilmelding fer fram við at ringja til Eydnu Berg, tlf. 219651 ella 319651

Les meira á www.zarepta.fo


